

LANDSVERK
*byggir land*

ÁRSFRÁGREIÐING 2013-14

# FULL FERÐ Á ALMENNARI BYGGING

# NÓGV VIRKSEMI KRING LANDIÐ



*Almenna byggivirksemið kring landið hevur av álvara tikið dik á seg seinasta árið*



Hóast skuggarnir frá fíggjarkreppuni, sum tók seg upp í 2008, merktu virksemið hjá Landsverki árini eftir, so er støðan nærum tann beint øvugta nú. Virksemið hjá stovninum hevur neyvan nakrantíð verið størri, og serliga seinasta árið er av álvara ferð komin á almennar byggiverkætlanir.

EWALD KJØLBRO
stjóri, Landsverk

Sjáldan áður hava so nógvar og stórar verkætlanir verið í gongd í senn. Eitt nú nýggi Skúladepilin við Marknagil, útbygging av Landssjúkrahúsinum og nýggj tunnilsfarleið til Viðareiðis, fyri at nevna tær størstu. Harafturat er eitt hav av størri og smærri verkætlanum, sum antin eru um at vera lidnar, standa í gerð ella verða fyrireikaðar til at fara undir.

Í hesum sambandi gerst spurningurin viðvíkjandi trygd á teimum mongu byggi- og arbeiðsplássunum kring landið týdningarmiklari enn nakrantíð. Landsverk hevur tí gjørt av at seta serligt fokus á trygd í 2014 og árini frameftir. Í breiðari merking fevnir hetta eisini um heilsu og umhvørvi.

Trygd er eisini fíggjarlig trygd, har stovnurin hevur ment eina stýringar- og eftirlitsskipan, ið ger tað munandi lættari at stýra og hava eftirlit við øllum verkætlanum og arbeiðum, sum Landsverk hevur um hendi. Yvirskipaða endamálið er sjálvandi, at kostnaður og játtan skulu halda. Meira um hetta á baksíðuni í hesi ársfrágreiðing.

Høvuðsuppgávan innan HTU-økið – sum stendur fyri heilsu, trygd og umhvørvi – verður at menna og tryggja viðurskiftini innan arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkunum, eins og at fyribyrgja umhvørvisdálking og skapa og menna eina grønari vangamynd av stovninum.

Í fyrstu syftu verður arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkunum kring landið raðfest, eins og ljós verður sett á trygdarviðurskiftini á teimum mongu byggiplássunum. Seinni verður hugt nærri eftir øðrum umhvørvisviðurskiftum.

## STARVSFÓLK TILVITAÐI UM TRYGD

Fyrsti partur av uppgávuni innan HTU-økið er at skapa góðar og tryggar


**ÁRSFRÁGREIÐING 2013-14**

**ÚTGEVARI**
Landsverk 2014 ©

**RITSTJÓRNAÐ OG SKRIVAÐ**
Kári Mikkelsen
samskiftisráðgevi

**KELDUR**
Stjóri og deildarleiðarar á Landsverki
Starvsfólk á
- Stjórnardeildini
- Byggideildini
- Deildini fyri infrakervi
- Framleiðsludeildini
- Aðrar keldur

**MYNDIR**
Hilbert Elisson

**RÆTTLESTUR**
Levi Hentze

**SNIÐGEVING OG UPPSETING**
Meitilberg.com

**PRENT**
Føroyaprent

**ENDURGEVING**
Við endurgeving av innihaldi í hesi ársfrágreiðing, skal Landsverk týðiliga upplýsast sum kelda

karmar at arbeiða undir. Yvirskipaða málið er, at starvsfólk hvønn dag kunnu fara eins frísk og røsk heim, sum tey vóru, tá arbeiðsdagurin byrjaði.

Farið er undir miðvísar vitjanir á øllum arbeiðsplássum, sum Landsverk beinleiðis varðar av. Endamálið er at fáa eina greiða mynd av, hvussu stendur til við trygdarviðurskiftunum, og hvørja áskoðan starvsfólk hava á hesi viðurskifti.

Sum stjóri á Landsverki havi eg valt at ganga undan og luttók tí í einum av teimum fyrstu trygdarskeiðunum, sum eru skipað eftir nýggja trygdarleistinum. Eitt nú kann nevnast, at fráboðanir verða lagdar í eina fasta legu, øll skulu luttaka á trygdarskeiði, regluligir trygdarfundir verða hildnir, HTU-leistur verður lagdur – longu áðrenn ein verkætlan fer í gongd – eins og kravt verður, at skelting og trygdarútgerð altíð eru nøktandi.

Starvsfólk skulu vera tilvitað um, at trygd er ein partur at dagligdegnum. Somuleiðis skulu tey javnan hava dagført sína vitan, so trygd gerst ein heilt natúrligur partur av arbeiðsmentanini hjá tí einstaka.

**HTU-SAMSKIPARI SETTUR**

Sum heild hava bæði vanlig starvsfólk eins og leiðarar tikið væl ímóti nýggja trygdarpolitikkinum hjá Landsverki. Hesar royndir hevur nýggi HTU-samskiparin á stovninum, Karina Nattestad Nolsøe, gjørt sær, síðani hon varð sett í starv 1. februar 2014.

Útgangsstøðið fyri arbeiðinum eru starvsfólk hjá Landsverki – eins og fólk undir øðrum arbeiðsgevarum, sum arbeiða fyri stovnin – og tí hevur HTU-samskiparin longu verið úti á nógvum arbeiðsplássum. Endamálið hevur verið at fáa eina greiða mynd av, hvussu tað stendur til við trygdini og hoyra, hvørja áskoðan starvsfólk hava um hesi viðurskifti.

Sum heild eru starvsfólkini rættiliga tilvitað um trygd, kenna til vandarnar og eru greið yvir, hvussu arbeiðs-uppgávurnar kunnu fremjast á tryggan og nøktandi hátt. Vit kunnu eisini við gleði staðfesta, at nógv góð trygdartiltøk eru at síggja kring landið.

Landsverk hevur seinnu árini eisini sett ljóskastaran á umhvørvið, og hvat íkast stovnurin kann gera í strembanini eftir at taka best møguligt atlit at umhvørvinum. Í hesum sambandi er byggideildin á Landsverki farin undir



at skráseta allar oljutangar í øllum almennum bygningum, sum stovnurin umsitur. Hetta fyri at tryggja, at tangarnir eru í nóg góðum standi og harvið ikki dálka.

**SETA KRØV TIL ENDURNÝTSLU**

Seinasta árið hevur eisini verið arbeitt við at dagføra strategi, mál og fokusøkir fyri Landsverk í 2014 og árini frameftir. Her kann staðfestast, at krøvini til stovnin broytast, tað sama ger tøknin, eins og nýggjar og øðrvísi uppgávur leggjast afturat.

Eitt dømi um nýggj krøv er júst økt umhvørvisvernd, ið eg longu havi verið inni á, og sum vit sjálvandi vilja vera við til at fáa framt í verki.

Í hesum sambandi er Landsverk farið undir at seta í verk sokallaðu ESCO-skipanina (Energy Service Company), ið hevur til endamáls at spara orkunýtslu í einum bygningi. Til dømis eini 20-30 prosent við at gera neyðugar ábøtur, sum kunnu gera sparingina møguliga. Fyribils er ætlanin at gera eina roynd við 10 almennum bygningum, ið eru valdir út millum øll aðalráðini.

Í vár boðaði Landsverk frá í tíðindaskrivi, at frá 1. september 2014 verða ásett krøv í útbjóðingartilfari í sambandi við asfalteringsarbeiðir um, at møguligt avfresað tilfar altíð skal endurnýtast.  Sum eina nýggja tænastu bjóðar Landsverk at taka ímóti avfresaðum asfalti í Hundsarabotni. Meira kann lesast um endurnýtslu av asfalti aðrastaðni í hesi ársfrágreiðing.

Fyri at taka saman um farna árið, eru vit farin undir nógvar spennandi uppgávur, sum okkara dugnaligu starvsfólk gera alt fyri at loysa á best møguligan hátt. Hetta krevur, at vit sum stovnur hava gott samstarv við bæði ráðgevarar, byggifyritøkur og aðrar arbeiðstakarar, aðalráð, kommunur, havnamyndugleikar, aðrar myndugleikar, eins og vanligar borgarar í Føroyum. Eitt samstarv, ið sum heild gongur væl.

Sum stjóri fyri størsta byggiharra í landinum og tann stovnin, sum varðar av øllum infrakervi á landi, lands-havnum, veðurstøðum, framleiðslu av asfalti, skervi og øðrum tilfari, síggi eg fram til at varðveita hetta góða samstarvið. Hetta fyri at fáa best møgulig úrslit av teimum uppgávum, ið standa fyri framman, og sum vónandi vera til gleði fyri allar borgarar landsins.

## TRYGGARI HAVNA-VIÐURSKIFTI Í SVÍNOY



Ein verjugarður og betri trygdar-útbúnaður hava bøtt um havnaviður-skiftini í Svínoy. Ábøturnar hava kostað 1,25 mió. krónur.

Saman við Klaksvíkar kommunu gjørdi Landsverk í 2013 ymsar ábøtur á havnalagið við Eiðið, har onnur atløgubryggjan til ferðasambandið í Svínoy liggur, eins og ábøtur eru gjørdar við havnarløgini í bygdini.

Ein seks metur langur verjugarður er gjørdur úti í Glógvansurð, sum hevur til endamáls at verja uttasta partin á bryggjuni, har tað breyt og kundi gera bryggjuna rættiliga hála. Dekkini á øllum trimum havnaløgunum í Svínoy – í Glógvansurð, í Víkini og við Eiðið – eru øll bøtt og slættaði við einum tunnum betonglagi omaná, har tað hevur verið neyðugt. Eisini er nýggj girðing gjørd fram við bryggjukantinum við Eiðið. Tilsamans er talan um góðar túsund fermetrar, sum ábøtur eru gjørdar á. Somuleiðis er bøtt um trygdarútbúnaðin við havnirnar.

Umvælingin og ábøturnar hava kostað umleið 1.240.000 krónur. Arbeiðið er fíggjað av kontuni fyri stuðul til infrakervið á útoyggj, umframt av serligari kontu til havnina í Svínoy, sum Løgtingið hevur játtað pening til.

## 40 ÁR VIÐ BRÚNNI UM STREYM

Sama dag sum kenda brúgvin um Bosporus-sundið í Turkalandi, ið knýtir Evropa og Asia saman, var liðug, lat Brúgvin um Streymin upp fyri almennari ferðslu. Í oktober 2013 vóru 40 ár liðin, síðani koyrandi var eftir hesi – fyri føroyskt infrakervi – sera týdningarmiklu brúgv.

Týsdagin 30. oktober 1973 var hátíðar-dagur bæði í Sundalagnum og í Istanbul, tí tá vórðu ávikvist Brúgvin um Streym og brúgvin um Bosporus-sundið tiknar alment í nýtslu. Hóast munur í støðd, so mundi týdningurin av nýggja sambandinum í Sundalagnum lutfalsliga vera eins stórur fyri okkum føroyingar, sum fasta sambandið um Bosporus-sundið var fyri turkar.

Brúgvin um Streymin var samstundis fyrsta brúgvin fyri bilferðslu um Atlantshavið, og kostnaðurin fyri tátíðar størstu føroysku verkætlan nakrantíð, var umleið 14 mió. krónur.

Tað tók hálvttriðja ár at gera brúnna. Arbeiðið at gera undirstøðið byrjaði í mars 1971, og hálvttriðja ár seinni stóð brúgvin liðug. Brúgvin er 220 metrar long, 9,5 metrar breið (er síðani breiðkað við eini gongubrúgv) og 17 metrar høg. Frammanundan var ein byrging gjørd um sundið í 1970.

Í 1950 var ferðatíðin av Eiði til Havnar fýra tímar, men síðani brúgvin kom – og seinni eisini Kollfjarðartunnilin – tekur hetta minni enn ein tíma. Menningin av hesi farleið legði sostatt lunnar undir ein nýggjan hátt at búleikast í Føroyum, tí tað ikki í sama mun longur var neyðugt at búgva, har arbeiðsplássið var.

Trý ár eftir, at Brúgvin um Streymin var liðug, kom Norðskálatunnilin, og enn fleiri føroyingar fingu tá fulla gleiði av brúnni. Sundalagið gjørdist tá høvuðsferðslu-æðrin í Føroyum, tí nærum alt samband millum norður, suður, eystur og vestur – nú dagliga umleið 4.500 bilar – fara um hesa farleið. Brúgvin um Streymin hevur tí havt avgerðandi týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum.

Fyri fáum árum síðani varð brúgvin dagførd, og er nú sum nýggj. Í sambandi við høvuðsumvælingina, sum var liðug í 2011, varð nýggj gongubrúgv, ið er fest í norðaru brúgvasíðu, tikin í nýtslu. Hetta hevur gjørt tað trygt hjá fólki at ganga og renna tvørturum, tí tey nú ikki koma í samband við koyrandi ferðsluna.

Umvælingin av Brúnni um Streym kostaði umleið tað sama – umleið 14 mió. krónur – sum tað kostaði at byggja hana í síni tíð. Roknað til nútíðarprís hevði brúgvin kostað umleið 75 mió. krónur.

Til samanberingar kostaði brúgvin um Bosporus 200 mió. amerikanskar dollarar. Dagsins prísur hevði verið 1,05 mia. dollarar, sum svara til stívar 5,7 mia. krónur.

## BRÚGV UM KLINGRUVEGIN

Ein brúgv verður gjørd á innkomu-vegnum til Havnar, sum gongur um Klingruvegin norðan fyri býlingin Millum Gilja. Arbeiðið er komið væl áleiðis.

Brúgvin er ein stakverkætlan, sum er partur av samlaðu verkætlanini til nýggjan innkomuveg kring høvuðsstaðin.

Lisitatión var í oktober 2013, og lægsta tilboð átti J&K Petersen, sum bjóðaði seg til og fekk arbeiðið at gera fyri slakar 6,7 mió. krónur. Hitt tilboðið var frá Articon og var 9,0 mió. krónur.

J&K Petersen stendur fyri verkætlanini at gera brúgv um Klingruvegin í Hoyvíkshaganum oman fyri býlingin Millum Gilja



# HERT EFTIRLIT Í HAVNUM

*Havnin í Vestmanna er ein av teimum 14 ISPS-góðkendu havnunum í Føroyum*

Umframt hert eftirlit í floghavnum eftir yvirgangsatsóknina móti World Trade Center í New York fyri stívum 12 árum síðani, var eisini gjørt av at herða eftirlitið í skipahavnum. Eisini í Føroyum er eftirlitið hert ígjøgnum sokallaðu ISPS-skipanina.

14 føroyskar havnir eru góðkendar eftir ISPS-skipanini, og tær skulu reguliga skipa fyri venjingum fyri starvsfólkum, ið arbeiða hjá havnunum.

Enn hevur tíbetur ongin tilburður ella illgruni verið við nøkrum skipi í nakrari føroyskari havn, har neyðugt hevur verið at aktivera ISPS-skipanina. Men Føroyar – og harvið tær 14 góðkendu føroysku havnirnar – hava bundið seg til altíð at hava neyðugu tilbúgvingina til reiðar, um okkurt illgrunasamt tongir seg at onkrum skipi, sum er á veg inn í eina føroyska havn. Skipanin fevnir um havnir, ið avgreiða skip í altjóða sigling – ferðamannaskip, farmaskip upp á 500 BT ella meira – og Offshore boripallar, sum sjálvstøðugt kunnu flyta seg.

Tað er Landsverk, ið er góðkennandi myndugleiki og hevur eftirlit við ISPS-tilbúgvingini í Føroyum. Samskipari er Jákup N. Olsen á deildini fyri infrakervi hjá Landsverki.

Umframt venjingar í havnunum, skipar Landsverk fyri einum árligum fundi, har umboð fyri havnir og myndugleikar luttaka, og har viðurskiftini kring ISPS-skipanina verða umrødd. Endamálið við fundinum er at styrkja samstarvið millum havnirnar og myndugleikarnar.

Føroysku havnirnar, sum eru ISPS-góðkendar, eru Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar, Tofta, Miðvágs, Sørvágs, Fuglafjarðar, Vestmanna, Vágs, Tvøroyrar, Sunda, Eiðis, Leirvíkar og Sjóvar havnir.

## FAKTA UM ISPS

Yvirgangsatsóknin í New York 11. september í 2001 er beinleiðis atvoldin til ávísar broytingar í SOLAS (Safety of Life at Sea) altjóða sáttmálanum og ISPS-koduni (International Ship and Port Facility Code). Eftir yvirgangsatsóknina avgjørdi IMO (International Maritime Organisation), sum er stovnur undir ST, á fundi 20. november 2001 at kanna tørvin á at seta í verk fyribyrgjandi tiltøk ímóti yvirgangsatsóknum o.ø. ímóti skipum og havnum. Á einari ráðstevnu 12. desember 2002 samtykti IMO nakrar broytingar, sum skuldu verða fult settar í verk í seinasta lagi 1. juli 2004. Sáttmálin setir ávís krøv til tiltøk og ætlanir, sum havnirnar skulu seta í verk, og síðani skulu landsmyndugleikarnir góðkenna tiltøkini og ætlanirnar.



*Her verður gjørt klárt til at stoypa brúgv um Klingruvegin í Hoyvík*



# FERÐSLUTRYGDIN Í KOLLAFIRÐI VÆL BETRI

*Nýggja vinstrasnaringarbreytin við Sjógv hevur gjørt tað munandi tryggari við ferðslutunga vegamótið í Kollafirði*

**Eftir ynski frá og í samstarvi við Tórshavnar kommunu – vegna borgararnar í Kollafirði – hevur Landsverk seinasta vetur gjørt eina ferðsluoyggj við vinstrasnaringarbreyt við Sjógv fyri tey akfør, sum koma vestanifrá, eins og breiðkað vegin við eini innkoyringarbreyt til akførini, ið koma eystanifrá.**

Endamálið við vinstrasnaringarbreytum er sjálvandi at bøta um ferðslutrygdina við vegamót, har ferðslan er stór. Soleiðis eisini við Sjógv í Kollafirði, har trygdin nú er so góð, sum hon kann gerast við eini slíkari loysn. Somuleiðis er atkoman frá bygdini til busslumman broytt.

Avtalað var við Tórshavnar kommunu, at kommunan kundi gera eina gøtu frá buslummanum undir Sjóvará og yvir til Stórubrúgv. Í verkætlanini er hædd tikin fyri, at um kommunan ynskir, at borgarar skulu hava atgongd til brúnna, so er møguleiki gjørdur fyri, at kommunan kann gera gøtu uttan fyri bilverjuna. Sostatt fer gonguferðslan nú undir vegin við Sjóvará og ikki tvørtur um ferðslutunga landsvegin.

Nýggja vinstrasnaringarbreytin við Sjógv hevur gjørt tað munandi tryggari við ferðslutunga vegamótið í Kollafirði.

## TRYGGARI VEGUR TIL NORÐOYRAR

**Landsvegateinurin millum Klaksvík og Norðoyri er nú tryggari enn nakrantíð, eftir at gongubreyt er gjørd og ljós sett upp allan vegin.**

Tað er nú munandi tryggari at ganga millum Klaksvík og Oyrar, sum tað verður rópt har norðuri, eftir at seinasti teinurin á umleið 700 metrar er gjørdur liðugur sum ætlað.

Samlaði vegateinurin er umleið 2,2 kilometrar langur, og eftir at seinasta arbeiðið er gjørt, er bæði gongubreyt og ljós allan vegin úr Klaksvík til Norðoyrar. Frá kirkjugarðinum til Klaksvíkar er gonguteigur í báðum síðum, meðan restin av teininum hevur gongubreyt í aðrari síðuni. Somuleiðis er ein ferðsluforðing sett upp.

Landsverk hevur staðið fyri arbeiðinum, men bæði SEV og Klaksvíkar kommuna hava eisini luttikið í verkætlanini og goldið ein part í sambandi við, at leiðingar eru lagdar í gongubreytina. Fyri nøkrum árum síðani varð ferðsluhámarkið á vegnum sett niður úr 80 til 60 km/t.

## FERÐSLUTUNGUR VEGATEINUR BREIÐKAÐUR

**Ætlanin hevur leingi verið at breiðka landsvegin millum Skipanes og bygdina Skálafjørð, sum er millum ferðslutyngstu vegateinar í landinum. Hetta arbeiðið verður nú gjørt.**

Nakað av peningi varð sett av á fíggjarlógini fyri 2013, so arbeiðið kundi byrja. Articon átti lægsta boð til fyrsta



*Vegurin við Tjørnunes á Skálafjørðinum er av ferðslutyngstu vegateinum í landinum og verður nú breiðkaður*

og annað byggistig, sum var slakar 4,5 mió. krónur.

Ein partur av vegnum er gjørdur, og talan er sostatt um liðugtgerð av samlaða vegateininum millum Skipanes og Skálafjørð. Arbeiðið, sum nú verður farið undir at gera, er ein teinur á umleið 1.500 metrar norðan fyri Skipanes og Undir Gøtueiði, har ongin vegøksl er. Breiðkingin fer fram við at fylla upp niðanfyri, har hetta ber til, og í øðrum lagi taka av lendinum omanfyri.

Lisitatión var á heysti 2013, og inn komu fýra tilboð, har trý lógu sera tøtt, og lægst var Articon við 4.483.000 krónum. Kostnaðarmetingin var 4.337.000 krónur. Hesin parturin av arbeiðinum skal vera liðugur á sumri 2014.

Við í tilboðnum var ikki liðugtasfaltering, eins og gerð av bilverju á einum parti av vegateininum. Hetta arbeiðið verður gjørt, tá peningur er tøkur.

## BETRI FERÐSLUTRYGD Á TOFTUM

**Ein sokallað vinstrasnaringarbreyt er gjørd við landsvegamótið, har Høganesvegur á Toftum, sum gongur niðan móti Svangaskarði, byrjar. Tað vóru JHR Entreprenørar, sum áttu lægsta tilboð og gjørdu arbeiðið fyri slakar 2,7 mió. krónur.**

Arbeiðið hevur í høvuðsheitum fevnt um at breiðka landsvegin og gera sonevnda vinstrasnaringarbreyt við íbindingina Toftavegur-Høganesvegur. Vinstrasnaringarbreytin er á markinum við bygt økið, og endamálið við henni er tí eisini at minka um ferðina hjá bilum, ið koyra inn í bygt øki á Toftum.

Tríggjar fyritøkur lótu inn tilboð. Oman fyri tilboðið hjá JHR Entreprenørar lógu RTS Contractors við 3.618.000 krónum og J&K Petersen, sum bjóðaði seg at gera verkætlanina fyri 4.091.000 krónur. Kostnaðarmetingin, ið eisini fevndi um stuðlamúr oman fyri bátahylin á Toftum, var 3,4 mió. krónur. Arbeiðið var liðugt á vári 2014.

## NÝGGJ VIÐAREIÐIS-FARLEIÐ Á VEG

**Farið er undir nýggju farleiðina til Viðareiðis, ið fevnir um bæði tunnil og vegagerð. Í februar var hátíðarhald í skúlanum á Viðareiði, har stjórin á Landsverki í eini framløgu vísti, hvussu verkætlanin er sett saman, og hvussu hon skal fremjast. Eisini skrivaðu Landsverk og Samtakið Articon, ið átti lægsta boð, undir arbeiðstakarasáttmála til farleiðina.**

Verkætlanin viðvíkjandi nógv umrødda tunlinum til Viðareiðis við tilhoyrandi vegagerð, er nú komin so væl áleiðis, at arbeiðið er byrjað.

Tað var ikki fyrsta skot, men startskotið til verkætlanina, ið fór fram í februar, tá Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki, sum er byggiharri fyri verkætlanini, og Jón Sigurdsson, stjóri á Articon, skrivaðu undir arbeiðstakarasáttmála um gerð av tunli og tilkoyringarvegum. Hetta fór fram í skúlanum á Viðareiði, har eisini Jørgen Niclasen, landsstýrismaður á økinum, var hjástaddur og helt røðu undir hátíðarløtuni á Viðareiði.

Fimm fyritøkur og samtøk bjóðaðu seg fram til at gera verkætlanina. Lægsta boðið átti samtakið millum Articon og norska LNS, hvørs lægra boð var 174,9 mió. kr. Hinar fyritøkurnar, sum bjóðaðu, vóru íslendska Ístak, MT Højgaard Føroyar og J&K Petersen.

Samtakið Articon fekk arbeiðið, og síðani tá eru sparingar gjørdar, soleiðis at verkætlanin lýkur fíggjarkarmin í verklagslógini á 162 mió. krónur.

Um verkætlanina verður sagt, at endamálið er at tryggja eina hóskandi farleið til Viðareiðis. Á verandi farleið eru trupulleikar við grót- og skriðulopum, umframt at stórur partur av vegnum er einbreytaður.

Verkætlanin fevnir um ein 1.939 metrar langan tvíbreytaðan tunnil úr Hvannasundi til Undir Fossinum Inni í Dølum. Í Hvannasundi verður nýggjur vegur til tunnilsmunnan gjørdur, eins og nýggjur vegur frá Middali til og við Skúvadalsleiti, haðani verandi vegur – sum er umleið 1,4 kilometur til longdar – verður breiðkaður inn til bygdina á Viðareiði.

Seinastu ferðslutølini, sum eru frá 2012, vísa, at tað koyrdu 432 akfør um samdøgrið eftir Viðareiðisvegnum. Í 2024 er ferðslan mett at vera komin upp í 510 bilar.

Arbeiðið er byrjað, og skjótt verður sett á at bora hvannasundsmegin. Tilfarið úr tunlinum verður brúkt til tilkoyringarvegirnar, og møguligt avlop fer í grótbrotið til seinni brúk.

Nýggja Viðareiðisfarleiðin skal eftir ætlan takast í nýtslu í 2017.





# TUNNILSSEMJA LØGD FRAM

*Ætlanin er, at Eysturoyartunnilin skal koma upp báðumegin við Skálafjørðin, sum verður á Strondum og við Toftavatn*

**Áhugin var stórur, tá stóra søguliga politiska semjan um fast samband inn á Skálafjørðin og suður í Sandoynna var løgd fram ávikavist í Miðlahúsinum í Havn og Deplinum í Skálavík. Hetta var í februar 2014, har stjórin á Landsverki innleiddi við framløgu um ferðslukanningar, linjuføringar og onnur viðurskifti í sambandi við tunlarnar, og síðani fingu politikararnir orðið.**

Fast samband í Sandoynna hevur í mong ár verið eitt hjartamál fyri sandoyingar og politikarar tess, og skal dømast eftir uppmøtingini til kunningarfundin í Skálavík, hevur málið ikki skapt minni áhuga, nú ein loysn er í eygsjón.

Tað mundu vera oman fyri 150 fólk, ið høvdu leitað sær á Depilin í Skálavík 11. februar, tá stjórin á Landsverki, Ewald Kjølbro, legði fyri við at greiða frá ferðslukanningum, linjuføringum og øðrum tøkniligum upplýsingum í sambandi við teir komandi undirsjóvartunlarnar, Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin. Hetta var sama framløga, sum stjórin á Landsverki legði fram á kunnandi fundi í Miðlahúsinum eina viku frammanundan, sum politiska ungmannafelagið, Huxa, skipaði fyri, har ein 60-70 fólk vóru komin at lurta.

Tað vóru valfeløgini í Sandoynni, sum saman við Katrini Petersen, verkætlanarleiðara í oynni, ið eisini var orðstýrari á fundinum, sum høvdu tikið stig til kunnandi fundin.

Serliga fegnaðust politikararnir um, at tað umsíðir er eydnast at finna eina breiða semju um umstrídda málið, sum byrjaði fyri 12-13 árum síðani. Bæði í Havn og Skálavík søgdu flestu politikarar seg tó viljað ynskt, at Sandoyartunnilin varð gjørdur fyrst. Men her var víst á fíggjarliga veruleikan, sum ger tað neyðugt at byggja Eysturoyartunnilin fyrst. Hetta tí, at síðstnevndi skal vera við til at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir Sandoyartunlinum.

Ætlanin er at stovna eitt alment partafelag, hvørs leiðsla fær til uppgávu at fyrireika og útvega fígging til tunnilsætlanirnar, eins og gera verkætlanirnar til veruleika.

Sambært tíðarætlanini fer at vera koyrandi millum Streymoynna og Skálafjørðin í 2019, og millum Gomlurætt og Traðadal í Sandoy í 2021.

## VEGURIN SUM ARBEIÐSPLÁSS

**Um mánaðarskiftið mars-apríl skipaði Landsverk fyri 2-daga longum skeiðum undir heitinum "Vegurin sum arbeiðspláss". Skeiðini snúðu seg um trygdina hjá teimum, ið arbeiða framvið vegnum, eins og ferðslutrygdina sum heild í sambandi við vegarbeiðir. Ein treyt fyri at arbeiða við landsvegin er millum annað, at tað í minsta lagi altíð er ein á staðnum, har arbeitt verður, sum hevur prógv í hesum skeiði.**

Málbólkurin var sostatt bæði starvsfólk á Landsverki og hjá arbeiðstakarum og myndugleikum uttan fyri stovnin, sum eitt nú gera kaðalarbeiði ella annað arbeiði fram við vegnum. Eitt nú eru skeiðini ætlaði verkfrøðingum, teknikarum, løgreglufólki, arbeiðstakarum, vegformonnum og øðrum, ið hava vegin sum arbeiðsstað.

Skeiðini, sum ætlanin er at skipa fyri við jøvnum millumbilum, hava til endamáls at geva luttakarunum innlit í hesi øki: Lógir og reglugerðir á økinum – skelting, merking og fráboðan – skeltiætlanir, ábyrgd, eftirlit og samstarv við løgregluna – trygdarásetingar fyri vegarbeiðsfólk – merkingar av akførum og útgerð – greining av ferðsluóhappum – ferðslutrygd sum heild.

Skeiðini enda við eini roynd, har luttakarar, ið standa royndina, fáa prógv, sum er galdandi í 5 ár.

Ætlanin er javnan at skipa fyri skeiðum fyri teimum, ið hava vegin sum arbeiðspláss



# ASFALT SKAL ENDURNÝTAST

*Frá á heysti 2014 skal alt avfresað asfalt endurnýtast og ganga inn í framleiðsluna av nýggjum asfalti*

**Til tess í størri mun at taka hædd fyri umhvørvinum, hevur Landsverk gjørt royndir við endurnýtslu av asfalti. Hetta hevur hepnast so mikið væl, at nú í 2014 verður farið undir at endurnýta avfresað asfalt í framleiðsluni. Somuleiðis fer stovnurin í størri mun at nýta sokallað sproytiasfalt til minni ferðslutungar vegateinar, ið er ein munandi bíligari framleiðsluháttur.**

Ikki einans er tað ein umhvørvisligur vinningur at endurnýta asfalt, men hetta fer eisini at bera í sær sparingar. Bæði tá talan er um rávøru eins væl og orkunýtslu. Størsta sparingin fæst við at endurnýta tilfarið í asfaltframleiðsluni á verkinum, sum ber í sær eina beinleiðis sparing av rávørum. Serliga er tað sparingin av bitumen, ið er ein innfluttur oljuúdráttur, sum verður nýtt sum asfaltbindievni, ið er áhugaverd.

Sæð frá einum umhvørvisligum sjónarhorni er rætt at endurnýta tað, sum endurnýtast kann. Í fleiri londum kring okkum er endurnýtsla av asfalti farin fram í fleiri ár. Landsverk hevur sennu árini gjørt royndir við endurnýtslu av asfalti, og hetta sær so mikið lovandi út, at stovnurin nú fer undir skipaða framleiðslu við endurnýttum asfalti.

Ymsir hættir eru at skipa endurnýtsluna, men tann mest vanligi er, at asfaltið verður avfresað á vegnum, koyrt í ein knúsara og síðani blandað við einum ávísum prosentparti av nýggjum asfalti. Í fyrsta lagnum, sum er sokallaða berilagið, ber til at nýta upp í 40 prosent av gomlum asfalti. Í ovasta lagi, slitlagnum, er tað nakað minni.

Fyrstu royndirnar við íblanding av avfresaðum asfalti vóru gjørdar í 2011, og úrslitini hava verið góð. Í 2014 er so ætlanin at nýta endurnýtt asfalt sum fastan part av nýframleidda asfaltinum. Landsverk hevur valt eina loysn, sum ber í sær, at avfresaða tilfarið verður koyrt beinleiðis í blandaran.

Royndir, sum eru gjørdar á royndarstovuni hjá Landsverki, vísa, at so at siga alt bitumen, ið verður nýtt í blandingini, framvegis er til staðar, tá asfaltlagið verður avfresað.

Við at endurnýta til dømis 30 prosent, verður talan um eina minni nýtslu av oljuúrdrátti í sama lutfalli. Umframt at gagna umhvørvinum, er eisini talan um eina fitta sparing í mun til at keypa nýtt inn. Í fjør innflutti Landsverk fyri umleið 10 mió. krónur av asfaltbindievni.

**KRØV UM ENDURNÝTSLU Í ÚTBJÓÐINGUM**

Frá 1. september 2014 fer Landsverk at áseta krøv til alt útbjóðingartilfar í samband við asfaltarbeiðir, um at møguligt avfresað tilfar altíð skal endurnýtast. Sum eina nýggja tænastu bjóðar Landsverk at taka ímóti avfresaðum asfalti í Hundsarabotni.

Ein onnur broyting í framtíðar asfaltframleiðslu er, at Landsverk í størri mun fer at nýta sproytiasfalt til minni ferðslutungar vegateinar, og eisini her verður nógv at spara. Kanska upp ímóti einum helmingi í mun til tann háttin, sum nýttur verður í dag.

Sproytiasfalt er ein væl kendur framleiðsluháttur, sum fyrr varð brúktur í Føroyum, har skervurin verður lagdur út, asfalt sproytað útyvir, og sandur stroyddur omaná. Eins og viðvíkjandi endurnýtslu fer tað eisini í útbjóðingartilfarinum at verða kravt, at tilboðini taka hædd fyri møguleikanum at gera arbeiðið við sproytiasfalti.



# SAMBÝLI Í HAVN TIL SÁLARSJÚK

*Skjótt verður klárt at flyta inn í nýggja sambýlið til sálarsjúk, sum liggur Eystan Heyg í Havn og hevur 16 íbúðir*

**Eitt sambýli til fólk við sálarsjúku verður bygt Eystan Heyg í Havn og er klárt at flyta inn tíðliga á sumri 2014. Sambært uppskotinum frá MAP arkitektum, er sambýlið ikki ein bygningur, men heldur at kalla ein býlingur. Í verkætlanini eru pláss til 16 íbúðir, sum eru 35 fermetrar til støddar hvør.**

Í felagshølunum er møguleiki fyri at matgera- og eta í felagsskapi við onnur og takast við ymisk ítriv. Knýtt at felagshúsinum er eitt vaskarí til felags nýtslu hjá øllum íbúgvum.

Arbeiðið hevur gingið, sum tað skal, og tíðarætlanin heldur. Í skrivandi løtu eru útsíðurnar lidnar, og liðugtgerð innan er í gongd. Somuleiðis er gongd í arbeiðinum at leggja inn HVS og el.

Arbeiðstakari er J&K Petersen Contractors, og tekniskir ráðgevar eru MAP Arkitektar, Verkfrøðingastovan, KJ EL-Ráð og PB Consult. Kostnaðarætlan er 16,2 mió.

Sambýlið verður liðugt og tikið í nýtslu 24. juli 2014.

## STØRSTA FØROYSKA EL-ARBEIÐSTØKA NAKRANTÍÐ

**Síðst í apríl 2014 undirskrivaðu Landsverk og LM Electric undir største sáttmála, sum ein føroysk el-fyritøka hevur gjørt í sambandi við eina byggiuppgávu í Føroyum. Talan er um arbeiðstøkuna til nýggja Skúladepilin við Marknagil.**

El-arbeiðstøkan, sum er ein av teimum níggju arbeiðstøkunum í byggingini av skúladeplinum, er 30,3 mió. krónur.

- Talan er um eina stóra og spennandi uppgávu, sum vit gleða okkum til at fara undir. Hetta er tann største einstaka arbeiðstøkan, sum ein føroysk el-fyritøka nakrantíð hevur fingið. Vit hava longu fólk á byggiplássinum, sum eru farin í gongd við at fyrireika tað arbeiðið, sum gerast skal, segði Pauli Hofgaard, stjóri í LM Electric, í sambandi við at sáttmálin varð undirskrivaður.

Stjórin á Landsverki var somuleiðis væl nøgdur við, at el-arbeiðstøkan umsíður varð undirskrivað.

- Vit fegnast sjálvandi um, at føroyskar fyritøkur eisini kunnu vera við í kappingini um at fáa so stórar og týdningarmiklar arbeiðstøkur sum hesa og gleða okkum til samstarvið, segði Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki.

Út á várið 2014 vóru tað umleið hálvthundrað mans á byggiplássinum við Marknagil, har tað í høvuðsheitum var stoypiarbeiði av fundamentum og betongveggum, sum arbeitt var við tá. Stóra arbeiðið undir jørð var tá eisini komið væl undir land, hóast tað enn var fitt av jørðarbeiði eftir at gera, sum verður gjørt, so hvørt farið verður víðari til næstu byggistigini. Veggir eru stoyptir í niðastu og næstniðastu hædd, har tilfar skal fyllast upp ímóti.

Tær níggju arbeiðstøkurnar við Marknagil eru: Jørð, kloakk, betong og stálarbeiði – innilokan – innrætting o.a – el-arbeiði o.a. – HVS, luftskiftisskipanir o.a. – múraraarbeiði o.a. – málaraarbeiði – lendisarbeiði o.a. – byggipláss.

Skúladepilin við Marknagil fer at hýsa einum samanløgdum studentaskúla, handilsskúla og tekniskum skúla við felags hentleikum og felags leiðslu. Samlaða gólvvíddin er 19.500 fermetrar, og pláss verður fyri umleið 1.300 næmingum. Málið hevur frá byrjan verið at hátta byggingina soleiðis, at undirvísingin kann skipast kreativt og nýhugsandi, eins og hon skal vera fakliga og námsfrøðiliga slóðbrótandi.

Til tess at lúka framtíðarinnar ókendu krøv til undirvísing, verður byggingin myndað við smidligum loysnum og fjøltáttaðum rúmleika, eins og partar av skúlanum vera opnir fyri næmingum alt samdøgrið.

Kostnaðarætlanin fyri verkætlanina er 515 mió., íroknað innbúgv og annað, og skúlin skal eftir ætlan takast í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2016.



# MIÐNÁMSSKÚLI VERÐUR UMVÆLDUR

*Á vári 2014 byrjaði umvælingin av Miðnámsskúlanum í Hovi, sum skal verða liðug við skúlaársbyrjan í august*

**Eftir at trupulleikar hava verið við lekum og gjóstri líka síðani Miðnámsskúlin í Suðuroy varð tikin í nýtslu í 2009, er MT Højgaard, sum bygdu skúlan, farnir undir at umvæla hann. Fyritøkan bæði rindar og stendur fyri at gera umvælingina, ið skal vera liðug áðrenn skúlaársbyrjan 2014.**

Fimm ára gamli Miðnámsskúlin í Suðuroy, sum liggur í Hovi, hevur líka frá tí, at flutt var inn í skúlan, havt trupulleikar við gjóstri og lekum, sum vórðu staðfestir beinanvegin.

Landsverk og MT Højgaard, sum stóðu fyri byggingini av skúlanum, gjørdu í september 2013 avtalu um, at danska byggifyritøkan sjálv stendur fyri umvælingini og rindar kostnaðin av henni. Tó gera føroyskir undirarbeiðstakarar størsta partin av umvælingini.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um at umvæla brekini í útveggunum bæði innan og uttan, eins og gera tey fylgiarbeiði, ið standast av hesum.

Eftir ætlan skal arbeiðið verða liðugt, so Heilsuskúlin, ið flutti í leigaði høli í Vági, meðan umvælingararbeiðið fer fram, kann flyta inn aftur við skúlaársbyrjan 2014.

## TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK ÚTBYGDUR

**Arbeiðið við at um- og útbyggja Tekniska Skúla í Klaksvík byrjaði tíðliga á vári 2014.**

Í tørvslýsingini fyri útbygging av Tekniska Skúla í Klaksvík stendur, at eftir at útbúgvingartilboðið í sambandi við matvøruútbúgvingina er økt, er tørvur á at raðfesta hølisviðurskiftini til matvøruútbúgvingina. Í hesum sambandi verða umstøðurnar til HF eisini bøttar, og Tekniski Skúli fer eftir útbyggingina at hýsa hesum báðum útbúgvingartilboðunum. Umframt víðkan og tillaging verður eisini talan um dagføringar av samlaða virkseminum á skúlanum.

Kostnaðarkarmurin fyri verkætlanina er tilsamans 35,4 mió. krónur. Sambært tíðarætlanini verður byggingin klár at taka í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2015.

## VARDIR BÚSTAÐIR Í RUNAVÍK OG KLAKSVÍK

**Talan er um at byggja tilsamans 24 vardar íbúðir í ávikavist Runavík og Klaksvík. Verkætlanirnar verða bygdar nøkunlunda samstundis. Í báðum førum átti Kanjon lægsta boð, og ávikavist í februar og mai 2014 var farið undir at byggja í Klaksvík og Runavík.**

12 av íbúðunum skulu liggja í Runavík, og hinar 12 í Klaksvík. Av teimum fýra fyritøkunum, sum bjóðaðu, átti Kanjon bæði lægstu boðini til báðar verkætlanirnar. Samlaða játtanin er 38 mió. krónur fyri tær 24 íbúðirnar.

Um verkætlanirnar verður sagt, at stórur tørvur er á vardum bústøðum til fólk við skerdum førleikum. Hetta hevur tann politiski myndugleikin eisini ásannað. Tí hevur landstýriskvinnan í almannamálum, Annika Olsen, tikið avgerð um at steðga við at keypa vanlig sethús og at umbyggja tey til sambýlir, men heldur fara undir eina tilgongd at byggja nýggjar tíðarhóskandi bústaðir, sum eisini yvir tíð kunnu koma í staðin fyri nøkur av verandi sambýlum.

Báðar verkætlanir skulu verða lidnar og klárar at flyta inn í tíðliga á sumri 2015.



*Umleið 36 mió. kr. eru settar av til at um- og útbyggja Tekniska Skúla í Klaksvík*



# DEPIL FYRI BØRN OG UNG VIÐ FJØLBREKI

*12 av teimum 24 nýggju vardu íbúðunum fara at liggja í Klaksvík, og hinar 12 í Runavík*

**Síðani á heysti 2005 hevur stovnurin Reiðrið virkað í Eysturoynni. Endamálið við stovninum er at veita eitt dag- og umlættingartilboð til børn og ung við fjølbreki. Hølis- og atkomuviðurskiftini hjá stovninum, sum húsast í einum vanligum sethúsum í Saltnesi, eru alt annað enn nøktandi. Tí varð farið undir at byggja nýtt.**

Bygdur verður ein depil, ið fevnir um dagtilboð við 12 plássum til børn og ung við fjølbreki. Somuleiðis 8 umlættingarpláss til børn og ung innan sama øki.

Depilin skal veita øllum fjølbrekaðum børnum og ungum í Føroyum tilboð til nevnda endamál, og hann verður nú bygdur í Runavík. Talan er um ungar brúkarar, sum eru bundnir at hjálp.

Í einum tilmæli frá 2008 til avvarðandi landsstýrismann var skotið upp at byggja ein miðdepil til fjølbrekað børn, sum hevur til endamáls at samskipa allar tænasturnar á einum staði. Hetta soleiðis, at øll tilboðini, sum í dag eru pettað sundur, frameftir verða eitt samanhangandi heildartilboð.

Grundað á hetta tilmælið, gjørdi núverandi landsstýriskvinna í almannamálum av at seta eina bygginevnd, sum hevur til endamáls at fremja partar av oman fyri nevndu verkætlan í verki.

Byggingin, sum Sp/f Byggivirkið KBH – við lægsta tilboði á 15,1 mió. krónur – fekk sum uppgávu at byggja, er komin væl áleiðis. Tað eru Arkitektar 99, ið hava teknað bygningin. Ráðgevarar eru KJ-Elráð, HMP-Consult og PB-Consult.

## LANGTÍÐARÆTLAN UM ÚTBYGGING AV LANDSSJÚKRAHÚSINUM

**Nýggi H-bygningurin, sum skal byggjast niðan fyri Landssjúkrahúsið oman móti sjóvarmálanum, er partur av eini langtíðarætlan fyri um- og útbygging av Landssjúkrahúsinum. Hetta byggistigið fevnir um nýggjar medisinskar seingjardeildir, føði- og barnsburðardeild, psykiatriskan depil, hølir til sjúkrahúsuppvenjing og køk.**

Tilsamans er talan um umleið 10.000 fermetrar. Í mars 2014 var ráðgevarasáttmáli undirskrivaður við Faerport II, ið er eitt samtak millum Selmar Nielsen Arkitektavirki, Árna Winther Arkitektar, LBF og Sofus M. Jakobsen.

Dagføring av skipanaruppskotinum varð liðug um mánaðarskiftið mai-juni. Verkætlanin skal vera klár at bjóða út um árskiftið 2015-16, tó at avgrevstur og grovplanering verður bjóðað út í 2014.

H-bygningurin er partur av samlaðu játtanini til Landssjúkrahúsið á 489,3 mió. krónur, sum gongur fram til 2019. Eftir ætlan skal byggiarbeiðið vera liðugt í februar 2019.

## VASKARÍIÐ Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM UMVÆLT

**Eftir eina umfatandi umvæling og útbygging eru umstøðurnar á vaskarínum á Landssjúkrahúsinum nú vorðnar munandi betri.**

Sjálv nútímansgerðingin og umvælingin, sum varð liðug í august 2013, hevur kostað 12 mió. krónur, meðan aðrar 8,5 mió. krónur eru nýttar til at keypa og seta upp nýggja útgerð.

Arbeiðið gekst væl, hóast verkætlanin kravdi neyva planlegging, tí vaskaríið var virkið so at siga alla tíðina, meðan arbeiðið fór fram.

Umvælingin og umbyggingin er partur av samlaðu játtanini til Landssjúkrahúsið á 489,3 mió. kr. fram til 2019.



# STÓR ÚTBYGGING AV LANDSSJÚKRAHÚSINUM

*Fram til 2019 eru slakar 490 mió. krónur settar av til um- og útbygging av Landssjúkrahúsinum*

## FRAMLEIÐSLU-HØLIR TIL APOTEKSVERKIÐ

**Seinastu árini hevur verið arbeitt við at dagføra heilivágsframleiðsluna hjá Apoteksverkinum. Verkætlanin fevnir um at innrætta framkomin framleiðsluhøli og keyp av framleiðslutólum til framhaldandi dagføringar av heilivágsframleiðslu.**

Avhending av sjálvum byggiarbeiðinum fór fram í oktober 2013.

Liðugtgerð av installatiónum, uppseting av tólum og alt endaligt arbeiði skal verða liðugt í juni 2014. Fíggjarligi karmurin fyri verkætlanini er 26 mió. kr.

## HEILDARÆTLAN FYRI TINGANES

**Í fleiri ár hevur peningur verið settur av til at gera ábøtur og umbyggingar av ognunum í Tinganesi, so tær kunnu verða varðveittar sum søgu- og fornminni, samstundis sum tær eisini kunnu gerast tignarligur og nýtslugóður karmur til fyrisiting løgmans og landsstýrisins.**

Seinastu umleið 10 árini hevur Løgtingið játtað upp til 3 mió. kr. árliga á fíggjarlógini, so at partar av hesi visjón kunnu gerast veruleiki. Í 1999 var fyrsta- og miðhæddin av Skansapakkhúsinum umvæld og broytt, so aldargamla sniðið kemur til sín rætt, og í 2007 var kjallarin í Skansapakkhúsinum loksins liðugt umbygdur og snøggaður til tignarliga matstovu og samkomuhøli.

Síðani tá eru aðrir partar av ognunum umvældir. Leigubúðin er partvís umvæld uttan, og alt er tikið innan úr bygninginum í samstarvi við Fornminnissavnið. Ætlan er gjørd fyri nýinnrætting, sum byrjar í næstum. Hendan leggur upp til at fáa skapið av gomlu fimleikarhøllini framaftur, við at taka loftsgólvið burtur, soleiðis at opið verður upp í tróðrið. Hetta arbeiðið verður ætlandi liðugt á sumri 2015.

Ætlan fyri nýggjari og skipaðari ljósseting og skelting er gjørd. Hetta arbeiðið verður liðugt í ár, eins og smærri umvælingar eru gjørdar innan í Skibsted Skansagarði og Skibsted Pakkhúsi.

Tað hevur verið heldur trupult at leggja til rættis arbeiðið í Tinganesi og gera alt liðugt í eini heild. Hetta orsakað av, at einans smáar peningaupphæddir hava verið játtaðar fyri eitt ár í senn, og tí ongin djúptøkin heildarætlan hevur verið til taks.

Í 2008 var farið undir at orða eina heildarætlan fyri Tinganes við tí endamáli at fáa allar ognir umvældar og skipaðar í eini heild, so staðið kemur til sín fulla rætt sum fornminni, ið myndar okkara søgu- og tjóðarsamleika, samstundis sum tað verður nýtt til stjórnarfyrisiting. Tað fer eisini at hava við sær, at Tinganes í nógv størri mun kemur ferðavinnuni til góðar.

Verkætlanin er gjørd í samstarvi millum Løgmansskrivstovuna, Landsverk, Føroya Fornminnissavn og umboð fyri tey stjórnarráð, ið húsast í Tinganesi. Harumframt verða aðrir viðkomandi stovnar og onnur tikin við í verkætlanina eftir tørvi. Felagið Kontrast við Mayfinni Norðoy hevur ráðgivið og skrivað álitið.

Samlaði kostnaðurin at umvæla ognirnar í Tinganesi yvir fimm ár er mettur til 44 mió. krónur í 2009-prísum. Játtanin í 2013 var 3 mió. krónur, meðan 2 mió. krónur eru settar av í 2014.

*Landsverk hevur heilar 26 veðurstøðir kring landið, sum skráseta veðrið allatíðina*





# METSTÓRUR ÁHUGI FYRI VEÐURMÁTINGUM

**Skal dømast eftir teimum mongu vitjanunum á Landsverk.fo, halda føroyingar seg væl kunnaðar um veðrið, tá tað er av slíkum slagi, sum vit upplivdu eitt vikuskifti mitt í desember 2013. Ongantíð áður hava so nógvar vitjanir verið á heimasíðuni hjá Landsverki ein einstakan dag, sum tað var í sambandi við desemberódnina .**

"Veðrið má sær ráða", sigur gamla føroyska orðatakið. Og hóast vit onki fáa gjørt við tað, so er týdningarmikið hjá nógvum okkara at vita, hvussu veðrið háttar sær.

Serliga er tað, tá ivaveður ger seg galdandi, at vitjanartølini økjast í stórum. Jú verri veðurvánirnar eru, tess fleiri halda seg kunnaði um veðurstøðuna. Og tá veðrið ber av, eru vitjanirnar tilsvarandi fleiri.

Ein uppgerð yvir vitjanartølini í ódnarvikuskiftinum hálvan desember 2013 vísa, at 14.584 ymiskir brúkarar vóru inni og kunnaðu seg um veðrið. Hetta er methøgt tal alla ta tíðina, Landsverk hevur bjóðað hesa tænastu. Til samanberingar kann nevnast, at næsthægsta talið, sum var mált 2. og 3. februar í 2011, var 14.142. Ein vanligan dag liggur talið um 2-3.000 vitjandi.

Afturat methøga vitjanartalinum á heimasíðuni tað vikuskiftið, kann nevnast veðurappin hjá Landsverki "Veðrið í lumman", ið er gjørd til snildtelefonir og teldlar. Ein tænasta, sum kom í mai 2012. Eisini hendan setti met við sløkum 1.600 brúkarum. Sostatt er samlaða talið av vitjandi, sum hava kunnað seg um veðrið hjá Landsverki undir desemberódnini, nógv tað hægsta nakrantíð.

Stóri eftirspurningurin eftir kunning um veðrið týðir sostatt uppá, at íløgan í tær mongu nýmótans og framkomnu veðurstøðirnar hjá Landsverki kring landið – í alt 26 í tali – hevur verið skilagóð.

Hægstu mátingar um hendan ódnarsunnudagin vórðu máldar á Oyndarfjarðarvegnum við 73,9 sekundmetrum, Norðradalsskarð við 70,8 sekundmetrum og Gjáarskarð við 61,3 sekundmetrum.

Áhugin fyri ódnunum var ikki bert her heima. Uppgerðin yvir vitjandi vísir, at nógvir brúkarar uttanlands fylgdu ódnunum umvegis Landsverk.fo.



# PLÁSS FYRI MEIRI ALING

*Við eini nýggjari siglingarleið inn á Skálafjørðin, verður møguleiki fyri at ala fram við Neslandinum út móti Eystnesi*

**Alingin á Kollafirði og Tangafirði verður víðkað við einum aliøki út fyri Nesi. Hetta merkir, at siglingarleiðin inn á Skálafjørðin nú verður broytt.**

Sum siglingarleiðin er frá Eystnesi og fram við landi inn ímóti Skálafjørðinum, ber ikki til at fáa líkinda aliøki fram við Neslandinum.

Landsverk hevur tí kannað møguleikarnar fyri at leggja siglingarleiðina inn á Skálafjørðin longri frá landi fyri at fáa pláss fyri alivirksemi. Í hesum sambandi hevur stovnurin ráðført seg við millum aðrar Søfartstyrelsen og Kongshavnar Havn.

Úrslitið av hesum er ein ætlan, sum í høvuðsheitum fevnir um, at ljósvinklarnir á vitanum á Toftum suðureftir verða sløktir. Ístaðin verður nýggjur vinkulviti settur upp á Strondum til at marka siglingarleiðina inn á Skálafjørðin sunnanífrá.

Bakgrundin fyri ætlanini er broyting av kunngerð nr. 134/2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, sum merkir, at sjóøkið millum Kaldbaksnes, Raktanga og Eystnes verður lagt afturat alifjørðinum Kollafjørður-Tangafjørður. Síðani hevur loyvisfyrisitingin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fingið umsókn um aliøki út fyri Nes.

Aliøki kunnu við hesum leggjast fram við Nes-landinum við hóskandi frástøðu til nýggju siglingarleiðina. Somuleiðis skulu bátar kunna sigla millum land og alistøðina.

Broytingin av siglingarleiðini inn á Skálafjørðin hevur verið til hoyringar hjá viðkomandi havnamyndugleikum, kommunum, loðsbólki, Sjóvinnustýri og Vørn.

## NÝGGJ SIGLINGARLEIÐ INN Á SØRVÁG

**Í sambandi við broytingina av siglingini inn og út eftir fjørðinum verða tveir nýggir vitar settir upp.**

Aliøkini á Sørvágsfirði skulu eftir ætlan flytast til suðursíðuna á fjørðinum og longri út á fjørðin. Fyri at hetta kann lata seg gera, má siglingarleiðin á fjørðinum broytast nakað. Landsverk hevur staðið fyri at finna eina loysn, sum bæði útvegar hóskandi pláss til aling og til trygga sigling á fjørðinum. Í hesum sambandi hevur stovnurin ráðført seg við millum onnur Søfartsstyrelsen.

Ætlanin fevnir um, at verandi leiðiviti innast á Sørvágsfirði verður tikin niður, og tveir vinkulvitar settir upp ístaðin.

Broytingin verður sett í verk á sumri 2014. Aliøkini verða løgd soleiðis, at smábátar framvegis skulu kunna sigla á suðursíðuni á fjørðinum millum land og alistøðina.

Ætlanin hevur verið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og kommununi.



# ÓDNARVEÐUR ELVDI TIL NÓGVAR SKAÐAR

*Hóast skaðarnir vóru nógvir í tali í desemberódnini í 2013, so var í flestu førum bert talan um smærri skaðar*

**Beint fyri jól 2013 kom ein hervilig ódn, sum elvdi til nógvar skaðar á landsvegakervinum. Í flestu førum er talan um smærri skaðar, har tað gekk út yvir skeltir, men eisini nøkur busskýlir brotnaðu, eins og bilverjur koppaðu.**

Serliga var tað í norður og eystara partinum av landinum, at vindmegin var harðast, og hetta sæst eisini aftur á yvirlitinum yvir skaðar, sum eru staðfestir á landsvegakervinum.

Í Norðurøkinum hjá Landsverki, ið fevnir um Norðoyggjar og Eysturoy, eru eini 50 av teimum umleið 70 skaðunum, staðfestir. Nógv teir flestu skaðarnir eru á skelti, men í nøkrum førum er talan um brotnaði bussskýlir, eins og onkrar bilverjur og garðar máttu lúta undir nógva vindinum.

Hinir skaðarnir vóru í høvuðsheitum á landsvegakervinum í Streymoynni og í Vágum, meðan vegakervið í Sandoy og Suðuroy so at siga slapp snikkaleyst.



## HERVERK FRAMT Á ÚTGERÐ Í TRØLLA-NESTUNLINUM

**Hóast tað eru meira enn tvey ár síðani seinast, so hendir tað tíverri av og á, at herverk verður framt á útgerð í føroysku tunlunum. Í oktober 2013 var herverk framt á neyðljósskipanina í Trøllanestunlinum.**

Talan var um 10 av neyðljósunum, sum eru fest á veggin í Trøllanestunlinum. Átta í sjálvum tunlinum og tvey í stutta tunnilsarminum út í Djúpadal.

Tað er sera óheppið, heldur Landsverk, at ljósini ikki fáa frið, tí tey eru sett upp við einans endmáli. Nevniliga at betra um trygdina í tunlunum.

Seinast herverk varð gjørt á tunnilsútgerð, var í juli 2011, tá tað gekk út yvir skeltini í tunlunum Norður um Fjall, sum eru Árnafjarðartunnilin og Hvannasundstunnilin.

Áðrenn ta hendingina vórðu eisini herverk framd á ljósskipanina í Gásadalstunlinum og Hovstunlinum, eins og sløkkiútgerðina í Leynatunlinum og Norðskálatunlinum. Hesi herverk fóru fram í 2009 og 2010.

Eins og undanfarnu tilburðir var eisini herverkið í Trøllanestunlinum meldað til løgregluna.



# STÝRINGARSKIPAN BRÝTUR ÚR NÝGGJUM

*Við eini nýmentari elekstroniskari stýrisskipan, ið nevnist SEYF, hevur Landsverk fingið eitt sera gott amboð at stýra verkætlanum eftir.*

**Landsverk hevur seinastu árini ment og sett í verk eina nýggja stýringarskipan fyri verkætlanarleiðslu. Hóast skipanin er einføld, hevur hon víst seg at vera eitt sera effektivt stýringaramboð hjá verkætlanarleiðarum og eftirlitsamboð hjá leiðsluni. Skipanin er løtt at arbeiða við og tryggjar teimum, sum hvør sær hava ábyrgd fyri teirri einstøku verkætlanini, eitt fullkomið yvirlit yvir støðuna til eina og hvørja tíð.**

Alsamt strammari játtanir til almennar verkætlanir seinnu árini hevur natúrliga hert krøvini til enn neyvari stýring av teimum verkætlanum, ið Landsverk sum almennur byggiharri varðar av. Hetta veri seg krøv til bæði fakliga stýring, fíggjarstýring, tíðarstýring, eins og týdningin av – til eina og hvørja tíð – at hava nøktandi yvirlit yvir allar partar av verkætlanargongdini.

Vaksandi krøvini og málið hjá leiðsluni á Landsverki um enn neyvari stýring av verkætlanum, gjørdu, at stovnurin fyri nøkrum árum setti ein bólk av viðkomandi starvsfólkum at gera eitt tilmæli til, hvussu ein góð kt-skipan kundi mennast til verkætlanarstýring. Tað vil siga at fáa ment eina stýringarskipan, ið kundi samantvinna allar partar í eini verkætlanargongd, eins og samskifta, goyma og gagnnýta upplýsingar frá øðrum skipanum, sum eru viðkomandi í sambandi við verkætlanir.
Úrslitið av hesum gjørdist ein skipan, ið hevur fingið navnið SEYF, sum hugleiðir til enska orðið, SAFE, ið merkir trygd. SEYF stendur annars fyri Støða, Eftirlit, Yvirlit og Fíggjarstýring.

**NÓGVIR FYRIMUNIR**
Umframt at vera eitt gott stýringaramboð hjá verkætlanarleiðarum á bæði byggideildini og deildini fyri infrakervi, hevur nýggja skipanin – sum alsamt verður víðariment – nógvar aðrar fyrimunir við sær. Millum annað tað, at øll tey, sum nýta skipanina, sum frálíður koma at arbeiða á sama hátt, og at tað er lætt hjá eitt nú leiðsluni og øðrum starvsfólkum at halda seg kunnaðan um eina ávísa verkætlan.

Fyri verkætlanarleiðarar hevur íverksetanin av SEYF gjørt, at ymsu uppgávurnar, knýttar at eini verkætlan, eru samskipaðar og bert skulu avgreiðast á einum staði. Øll galdandi skjøl og frymlar eru somuleiðis savnað á einum staði. Hetta er alt við til at stytta um avgreiðslutíðina á flestu uppgávum. Ein trygleiki liggur eisini í, at øll kunning liggur á einum stað. Og ein kann altíð venda aftur til farnar hendingar, støður og líknandi. Ein stórur fyrimunur er, at øll nú tosa sama mál, tá tað snýr seg um verkætlanir.

Skipanin tekur somuleiðis støði í teimum fimm fokusøkjunum hjá Landsverki, um at stovnurin skal vera aktivt samskiftandi, samstarvsmennandi, trygdartilvitaður, effektivt hugsandi og fakliga tilvitaður.

Málið er, at verkætlanir verða stýrdar trygt bæði fakliga, fíggjarliga og so professionelt, sum gjørligt, so úrslitið í síðsta enda verður tað best møguliga.

**STÓRUR ÁHUGI FYRI SKIPANINI**
Skipanin, sum er ment í stigum og framvegis er undir menning, byrjaði sum ein eftirlitsskipan, men er síðani vorðin ein heildarskipan til at stýra verkætlanum eftir.

Ein av mongu fyrimununum við nýggju skipanini er ein sokallaður tjekklisti, sum til eina og hvørja tíð minnir hvønn einstakan verkætlanarleiðara á, hvussu støðan er í verkætlanini, hvat gerast skal, og hvar møguliga skal setast inn ella strammast upp. Ein annar týðandi fyrimunur er, at her finnur tú øll dagførd standardskjøl, amboð, vegleiðingar og mannagongdir. So hóast óroyndur í verkætlanarleiðslu, kann verkætlanarleiðarin kortini stýra eini verkætlan trygt við at fylgja leisitinum.

Sjálvt um SEYF-skipanin ikki er liðugtment enn, er hon kortini so mikið væl virkandi longu nú, at aðrir byggiharrar hava sýnt stóran áhuga fyri at ogna sær skipanina. Eitt nú tær stóru kommunurnar.

# ALMENN BYGGING TEKUR DIK Á SEG

**Umvælingar og íløgur í almennar bygningar gera eitt stórt lop í 2013 og enn størri í 2014, meðan íløgurnar í nýggjar vegir liggja á nærum sama støði.**

Orsøkirnar eru, at Marknagilsdepilin av álvara er farin í gongd. Eisini eru fleiri bústovnar í gerð, millum aðrar stovnurin í Runavík og teir báðir í Eysturoynni og Norðoyggjum. Landssjúkrahúsið og umvælingar av almennum bygningum fara somuleiðis við stórum upphæddum.

Íløgurnar í nýggjar vegir eru meira smábýttar. Tó fer stórur partur til nýggju farleiðina til Viðareiðis. Trygdartiltøk og dagføringar av vegakervinum fara eisini við nakað av peningi.




*Sum sæst á hesi strikumyndini eru fíggjarligu íløgurnar í bygningar frá 2012 og frameftir vaksnar rættiliga nógv. Íløgur í infrakervið eru eisini hækkaðar nakað, meðan játtanirnar til rakstur seinastu mongu árini hinvegin eru tódnaðar.*




*Av teimum 127,7 mió. krónunum, sum eru settar eru av til íløgur í landsvegakervið í 2013-14, fer meira enn triðingur til nýggja Viðareiðisleið við 46,4 mió. krónum. Á øðrum plássi liggur sum einstøk íløga nýggjur innkomuvegur til høvuðsstaðin við 11,2 mió. krónum, sum í høvuðsheitum er til brúnna um Klingruvegin. Leirvíkarvegurin fer við 8,5 mió. krónum, og breiðkan av vegi við Tjørnunes í Skálafirði við 6,2 mió. krónum. Til aðrar smærri verkætlanir kring landið eru tilsamans 25,2 mió. krónur settar av, meðan trygdartiltøk fara við 19 mió. krónum.*




*Ikki óvæntað fyllir Skúladepilin við Marknagil nógv á íløgusíðuni fyri 2013-14, ið fer vð 202,3 mió. krónur av teimum tilsamans 491,6 mió. krónunum, sum í alt fara til íløgur í almennar bygningar, íroknað umvælingar. Íløgur í bústovnar fara við 90,3 mió. krónum, meðan útbygging av Landssjúkrahúsinum stendur fyri stívum 54 mió. krónum. Tekniski Skúli í Klaksvík fer við 23,9 mió. krónum, Apoteksverkið við 22,9 mió. krónum, Miðnámsskúlin á Kambsdali við 19 mió. krónum, og á Klaksvíkar Sjúkrahúsi verða í 2013-14 nýttar 13 mió. krónur. Umvælingar av almennum bygningum sum heild standa fyri 51,9 mió. krónum, meðan 14,2 mió. krónur fara til aðrar smærri verkætlanir.*